## Grava út fyri stadion í Gøtu

Í gjár var farið undir at grava út og planera, nú stadion-økið í Gøtu skal betrast. Hetta so tað er í samsvari við UEFA-krøvini til føroyskan fótbólt.

Enn er ikki endaliga greitt, hvussu nýggja stadion-økið kemur at síggja út, men EM-ráðgeving í Gøtu hevur gjørt uppskot, sum kommunan skal taka støðu til. At arbeiðið kortini er byrjað longu nú, kemst av, at spreingiarbeiðið til nýggja handilsdepilin í Gøtudali er byrjað, og tí er upplagt, at grótið verður endurnýtt, nú stadion-arbeiðið kortini skal ígongd.



-mørk

## 30 mió kr. í bót til turkar

Tá fyrireikararnir av turkisku formil 1 kappingini lótu politikk vevjast upp í steypahandanina eftir ársins formil 1 koyring, fóru teir ov langt. Tí hevur felagsskapurin handan formil 1 FIA, dømt fyrireikarnar at gjalda størstu bót, ið nakrantíð er givin í formil 1, skrivar almenna heimasíðan hjá Formil 1.Turkiska ítróttarsambandið og fyrireikarnir av turkisku formil 1 koyringini skulu til samans gjalda út við kr. 30 milliónir í bót. Orsøkin er, at undir steypahandanini handaði Mehmet Ali Talat steypið fyri sigurin til Felipe Massa, ið vann koyringina. Hann varð presenteraður sum forseti fyri tann Turkiska Kypriotiska statin. Ein statur, ið einans Turkaland viðurkennur, skrivar f1.com.Stóra revsingin skal uttan iva skiljast, sum ein ávaring til øll lond, ið kundu funnið uppá at blandað altjóða politikk upp í formil 1 kappingina.

-nud

ÍF-GÍ 1-3 (1-1):

# Loksins bragdaði hjá GÍ

*ÍF*

*GÍ*

**Ellivu móti ellivu vóru tað gøtumenn, sum vóru omaná, tá ÍF og GÍ spældu nýggjan dyst í Formula-deildini**

**FÓTBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



Søguliga var talan um sera áhugaverdan dyst, tí hetta er fyrsta ferðin, at Kappingarnevndin hjá FSF hevur dømt tvey lið at spæla av nýggjum. Hetta hendi, tá GÍ kærdi fyrra dystin, har ÍF eitt skifti hevði spælt við 12 móti 11, tá hvørki dómarin ella 12. maðurin varnaðust støðuna. Avgerandi í hesum var, at ÍF í yvirtali legði seg á odda 2-1, men hóast GÍ seinni javnaði, so var hetta í teirra hugaheimi ikki nóg mikið.

Og fuglfirðingar mundu sum so neyvan hava tað heilt stóra ímóti einum nýggjum dysti. Fyrst og fremst, so er støðan í botninum somikið spent hjá ÍF, at eitt einsamalt stig ikki ger tann stóra munin. Og hartil hevur gongdin hjá GÍ verið av slíkum slag, at talan sum so ikki var um nakra ræðandi uppgávu, nú enn ein roynd skuldi gerast at vinna sær trý stig.

### Hava takið á ÍF

Tíggju ferðir á rað er GÍ nevnliga farið sigursleyst av vøllinum, men tann røðin varð brotin í Fuglafirði.

Tað tóktist annars ikki ganga eftir vild hjá GÍ, tá ÍF tíðliga í dystinum legði seg á odda eftir eina misskiljing í GÍ-verjuni.

Men hóast hetta, so hildu gøtumenn høvdinum høgt. Móti júst ÍF eru hagtølini hjá GÍ mest sum framúr, og onkursvegna var sjónligt, at teir ivaleyst áttu sálarligu yvirvágina. Teir meira ella minni settu seg á dystin, og hóast ein deyðbóltur skuldi til, so var tað fult uppiborið, at GÍ legði seg framum, tá Áslakur R. Petersen knallaði til, eftir at Sámal hevði rullað stutt fríspark til hansara.

Og eftir steðgin helt sama gongdin fram. GÍ helt á at trýsta, uttan at ÍF fekk kontraálopini, sum spæliætlanin legði upp til, og tá Sámal Joensen legði teir á odda eftir uppspæl úr høgru, tóktist sigurin koppa yvir um Kambsdal. ÍF hevði kanska eitt trýst í løtunum eftir hetta, men GÍ-verjan stóð stinn, og so kundi Gunnar Nielsen staðfesta, at hann aftur er við at raka formin. Hegnisliga lyfti hann bóltin í málið, tá málverjin var komin nakað út, og við 3-1 málinum var dysturin punkteraður.

### Mugu vinna í Vági

Hjá GÍ var sigurin fyrst og fremst ein styrkur av sjálvsálitinum, nú liðið mest sum er aftur úr siglt í stríðnum um europisku atgongumerkini, men hjá ÍF hevði dysturin størri týdning enn sum so. Tapið ber við sær, at ÍF nú er mest sum tvingað at vinna, tá teir fara til Vágs um vikuskiftið. Ein uppgáva, sum setir stór krøv til allar kreftir.

## FAKTA

**ÍF-GÍ 1-3 (1-1)**
**1-0:** Hanus Eliasen, 4.
**1-1:** Áslakur R. Petersen, 36.
**1-2:** Sámal Joensen, 57.
**1-3:** Gunnar Nielsen, 90.
**Dómari:** Petur Reinert
**ÍF:** Andras Gango – Jonn S. Thomsen (Árni Petersen, 65.) (Árni Petersen, 65.), Bartal Eliasen, Símun Eliasen, Frank Poulsen – Fritleif í Lambanum, Alexandar Jovevic, Høgni Zachariasen, Nenad Saric (Dánjal Pauli Højgaard, 59.) – Atli Petersen (Tórður Lerivg), Hanus Eliasen
**GÍ:** Geza Turi – Áslakur R. Petersen, Kaj Ennigarð, Poul Ennigarð, Magni Jarnskor – Símun Louis Jacobsen (Hans Jørgen Djurhuus, 71.), Sam Jacobsen, Sámal Joensen, Hanus Jacobsen -– Gunnar Nielsen (Erling Jacobsen, 90.), Poul Arni Jacobsen (Sverri Jacobsen, 84.)
**Gult kort:** Poul Ennigarð, Gunnar Nielsen, Sam Jacobsen, Poul Arni Jacobsen

**Formula-deildin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 EB/S | 23 | 15 | - | 5 | - | 3 | 58 | 24 | 34 | 50 |
| 2 HB | 23 | 12 | - | 7 | - | 4 | 54 | 35 | 19 | 43 |
| 3 B36 | 23 | 12 | - | 6 | - | 5 | 39 | 26 | 13 | 42 |
| 4 KÍ | 23 | 10 | - | 8 | - | 5 | 49 | 33 | 16 | 38 |
| 5 NSÍ | 23 | 11 | - | 5 | - | 7 | 46 | 34 | 12 | 38 |
| 6 GÍ | 23 | 8 | - | 10 | - | 5 | 31 | 29 | 2 | 34 |
| 7 Skála | 23 | 7 | - | 6 | - | 10 | 29 | 25 | 4 | 27 |
| 8 VB/S | 23 | 4 | - | 4 | - | 15 | 20 | 66 | -46 | 16 |
| 9 B68 | 23 | 3 | - | 5 | - | 15 | 30 | 52 | -22 | 14 |
| 10 ÍF | 23 | 3 | - | 4 | - | 16 | 22 | 54 | -32 | 13 |

## Mugu enda væl

Hóast GÍ loksins fekk ein sigur, so er lítil ivi um, at gøtumenn ikki longur hava møguleikan at røkka út í Europa. Og liðskiparin hjá liðnum, Sámal Joensen, ivast ikki, hvar orsøkin til hetta skal finnast.

- Vit hava snøgt sagt ikki verið nóg góðir. Seinastu nógvu dystirnar hava vit ikki megna at avgjørt tingini til okkara fyrimun, og tá trý stig verða latin fyri sigrar, kostar hetta. Samstundis er annars so sterka verjan farin at skinkla alt meira, men tað er kanska ein avleiðing av versnaðum sjálvsáliti. Hinvegin eru enn 12 stig eftir at spæla um, og tey mugu vit royna at vinna, heldur hann.

Sæð í mun til árið í fjør, so hevur 2006 tó ikki verið nøkur vanlukka fyri GÍ, men Sámal ivast tó ikki í, at teir skulu gera tað nógv betri.

- Hetta hevur ikki verið nóg gott. Vit vita sjálvir, at vit kunnu meira enn hetta, og nú ræður fyrst og fremst um at enda væl, soleiðis at vit hava nakað at byggja víðari upp á til komandi kappingarár.

-mørk